## Barcelona eisini úti

Longu nú er greitt, at 2010 ikki verður eitt eins gott ár hjá Barcelona, sum 2009, tá spanska stórfelagið vann allar seks kappingarnar, felagið var við í. Í gjárkvøldið spældi Barcelona seinnu áttandapartsfinaluna ímóti Sevilla í Copa del Rey. Barcelona, sum hevði tapt 1-2 heima í fyrra dystinum, vann á útivølli 1-0 á Sevilla, men tá mál á útivølli viga tyngri, so er Barcelona úti úr steypakappingini.



## Campbell aftur í Arsenal

35 ára gamli Sol Campbell verður helst partur av hópinum hjá Arsenal restina av hesum kappingarárinum. Í fyrrakvøldið spældi Campbell við, tá eykaliðið hjá Arsenal vann 4-2 á eykamonnunum hjá West Ham, og við Soccernet segði hann seg ætla at vera partur av Arsenal restina av árinum. – Eg gleði meg sum smábarn. Tað eru helst eini tvey ár síðani, at eg seinast spældi her, og eg havi saknað fótbóltin, síðani eg steðgaði í Notts County, sigur Campbell.

# Óli Hansen takkar fyri seg

**Liðformaðurin hjá NSÍ seinnu árini, Óli Hansen, er givin við fótbólti á hægsta stigi og verður ikki at síggja í Vodafonedeildini aftur. – Nú vit eru í januar mánaði, er hugurin ikki tann nógvi allíkavæl, men tá hann kanska kemur aftur, er 1. deildarfótbóltur nóg mikið fyri meg, sigur hann**

einslistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen

Tá NSÍ vann føroyameistaraheitið í mansfótbólti í 2007, var tað serliga tann eini setningurin, ið líkasum gjørdist slagorðið hjá liðnum. Og tað var hvørja ferð sami maður, sum brúkti henda setning, ið tað ikki er sørt, at aðrir spælarar síðani hava tikið til sín.

– Ein dyst í senn, var afturvendandi svarið frá Óla Hansen, tá miðlafólk vildu hava hann at siga, at nú fór NSÍ at gerast føroyameistari. Sjálvt um dúgliga var dyrgt eftir at fáa meira burtur úr honum, vildi hann ongantíð úttala seg um annað enn aktuellu dystirnar – og í mesta lagi ein dyst fram!

Nú fer hesin kapitulin í fótbóltinum í Runavík í søguna, tí 32 ára gamli Óli hevur tikið avgerð um, at hann nú gevst við fótbólti á hægsta stigi, har hann hevur verið í gongd síðani 1994. Sjálvur sigur hann, at avgerðin líkasum liggur til høgra beinið, tí arbeiðs- og onnur viðurskifti gera, at stundir ikki eru til at gera so nógv við fótbóltin, sum tað krevst í dag.

– Síðstu fimm ella seks árini er fótbólturin í Føroyum broyttur so nógv, tí fyrr vandu vit bara tríggjar ella fýra ferðir um vikuna, men nú verður vant hvønn dag, umframt at dystirnir eisini eru nógvir. Eg havi eisini tveir lítlar dreingir, eg skal taka mær av, og tá arbeiðsbyrðan frammanundan er stór, so ber ikki til at vera heilur allastaðni, skal pláss eisini vera fyri fótbóltinum, sigur Óli.

Dagliga hevur hann leiðandi starv í alifyritøkuni, Luna, sum hevur alivirksemi á Gøtuvík og í Vágum, umframt eitt kryvjivirki í Sørvági. Óli er leiðari á virkinum og hevur somuleiðis ábyrgd av sølu og útflutningi hjá fyritøkuni, og tí er talan altíð um langar arbeiðsvikur.



Hæddarpunktið á lívsleiðini hjá Óla Hansen í fótbólti var rokkið tann 27. oktober í 2007, tá hann eftir seinasta dystin í Klaksvík varð tveittur upp í loft av viðspælarum og viðhaldsfólkum, meðan hann sum frægast royndi at halda fast í meistarasteypinum

Mynd: Álvur Haraldsen

### Úr álopi í verju

Upprunaliga byrjaði Óli Hansen sum álopsspælari, og meginpartin av síni tíð sum fótbóltsspælari, hevur hann verið í álopinum. Men Jógvan Martin Olsen umskúlaði hann til verjuspælara, og tað hevur Óli ikki iðrað seg um. Og hóast hann spældi í verjuni, gjørdist hann toppskjútti hjá NSÍ í 2007.

– Øll hava síni mál, sum tey vilja røkka, og eg vil siga tað soleiðis, at eg sum verjuspælari havi rokkið teimum málum, eg hevði sett mær. Eitt var at gerast føroyameistari við NSÍ og eitt annað at koma á landsliðið, so eg haldi sjálvur, at eg havi fingið tað burtur úr fótbóltinum, sum míni evni eru rokkin til, sigur hann.

Barna- og ungdómsárini vóru øll í NSÍ og somuleiðis tey fyrstu árini sum vaksin spælari, men eitt skifti fór Óli til Gøtu at spæla við GÍ, har hann spældi í álopinum. Har var hann við til at vinna finaluna um Løgmanssteypið í 2005, tá GÍ vann 1-0 á HB – og Óli var sjálvur málskjúttin á Tórsvølli, har finalan var spæld.

Men hæddarpunktið í lívsleið hansara í fótbólti er avgjørt føroyameistaraheitið hjá NSÍ, sum kom sama ár, sum felagið fylti 50 ár. Hetta var eisini í aðrar mátar eitt søguligt meistaraheiti, tí høast felagið hevði vunnið nógv í barna- og ungdómsdeildunum, høvdu einastu týðandi sigrarnir hjá teimum vaksnu verið ein rúgva av uppflytingum, umframt sjálvandi steypakappingarnar í 1986 og 2002.

– Skal eg nevna størstu løturnar, so stendur føroyameistaraheitið í 2007 sjálvandi fremst, men samstundis havi eg nógv og øgiliga góð minni frá mínum yngru árum. Og tað fær meg at ásanna, at tað hevur øgiliga stóran týdning, at fótbóltsfeløgini og ítróttarfeløg sum heild ger nógv fyri børnini og tey ungu, sigur Óli Hansen.

### »Ein dyst í senn«

Tá sagt verður farvæl við ein spælara, sum serliga tey seinnu árini í fótbóltinum traðkaði í karakter, slepst illa undan at spyrja eitt sindur meira um henda setningin, greinin byrjaði við. Tá onnur siga »ein dyst í senn«, man tað hjá teimum flestu fáa tankarnar at leita til Óla Hansen og 2007, og tað sama gera tað hjá høvuðspersóninum sjálvum.

– Ja, tá eg nú hoyri aðrar spælarar brúka handa setningin, má eg smílast, tí tá hugsi eg aftur á meistaraheitið hjá okkum, og tað ger meg bara glaðan. Eg havi ikki funnið uppá at siga hatta, men hjá okkum riggaði tað í øllum førum, staðfestir nú fráfarandi liðformaðurin hjá NSÍ.

– Í 2007 var kappingin øgiliga hørð við fyrst og fremst B36, men av tí at hetta var ein nýggj støða hjá okkum, ið vit ikki høvdu roynt fyrr, máttu vit finna upp á okkurt, ið kundi taka trýstið av spælarunum. Tað bleiv so til tað, at allir vístu til mín, tá okkurt skuldi sigast, og tað vísti seg eisini at rigga fínt hjá okkum, at vit tóku ein dyst í senn.

Nú gaggurnar verða settar á hillina, er tó ikki givið, at Óli Hansen púrasta gevst við fótbólti, hóast hann er púra avkláraður við, at tað í øllum førum ikki verður í Vodafonedeildini, men kanska heldur á lægri stigi, um tað verður.

– Nú vit eru í januar mánaði, er hugurin ikki tann nógvi allíkavæl, men tá hann kanska kemur aftur, er 1. deildarfótbóltur nóg mikið fyri meg. Tað vildi verið upplagt, at tað var í NSÍ, men møguliga fara vit at flyta okkum nærri Vágoynni, so tað kann henda seg, at eg við mínari rutinu kann gera mun onkra aðrastaðni í lægri deild, sigur Óli Hansen at enda.